

Starvsfólkið á Barnadeildini – august 2015

# Vælkomin á Barnadeildina





**Okkurt, eg vil minnast:**

Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.ls.fo hevur Barnadeildin eisini eina síðu, har tit kunnu finna aðrar hentar upplýsingar.



**Vælkomin á barnadeildina**

Tá barnið verður innlagt er best, at mamman ella pápin verða innløgd við barninum (ella onkur annar, sum barnið kennir væl). Hetta hevur stóran týdning fyri, at barnið kann kenna seg trygt. Tað finnast fittar bøkur um børn á sjúkrahúsi, sum kunna lænast á bókasøvnum. Hesar kunnu vera ein góð hjálp hjá barninum til at ímynda sær, hvussu tað verður at koma á sjúkrahúsið. Eisini er heimasíðan www.hcand.dk ein góð síða, ið við teknifilmi greiðir frá ymsum kanningum, sum børn skulu til á sjúkrahúsi.

Barnadeildin, sum er á 5. hædd á Landssjúkrahúsinum, er fyri børn frá 0-14 ár. Vit hava 7 seingjarpláss. Dagliga arbeiða sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrahjálparar, læknar, læknaskrivarar, reingerðarfólk og námsfrøðingur á deildini. Børn kunnu eisini koma í samband við aðrar starvsbólkar so sum bioanalytikarar og fysioterapeutar, ið javnan vitja á deildini.

Vinarliga boða frá í móttøkuni, tá ið tit koma á Barnadeildina. Inni á deildini verða tit móttikin av sjúkrarøktarfrøðingi, sum vísir tykkum runt og hevur innleggingarsamrøðu. Barnið verður vigað og mátað. Yngri lækni kannar barnið, skrivar journal og sigur barnalæknanum frá. Set dagin av, tí vit vita ikki, hvussu langa tíð tað tekur við kanningum o.ø. Barnalækni kemur dagliga stovugongd. Skurðlæknar, eygnalækni, oyrna-nasa-háls- og tannlækni eru eisini knýttir at deildini.

Vit leggja stóran dent á at fáa gott samstarv við tykkum. Tit eru við at ansa barninum, og saman við tykkum gera vit tað, sum er best fyri barnið. Somuleiðis eru tit við til stovugongd og kanningar og verða kunnaði um, hvat skal fara fram og hví.

Um dagin verður barnið knýtt at einum ávísum sjúkrarøktarfrøðingi. Eru ivamál, spyr so endiliga.

Um kvøldið og náttina eru tvey starvsfólk til arbeiðis á deildini.

Tað er ymiskt, hvussu langa tíð barnið verður innlagt. Alt eftir, hvat bagir og hvat skal gerast og nær. Er barnið innlagt í fleiri dagar, og umstøðurnar loyva tí, ber væl til at sova heima og koma aftur dagin eftir.

Skal barnið doyvast (í narkosu), kann annað av foreldrunum vera hjá barninum á skurðstovuni, til tað sovnar. Viðrakning ringir á Barnadeildina, tá viðgerðin er liðug, og kunnu tit so vera aftur hjá barninum.

**Leiðari á deildini:** Rúna Wardum, sjúkrarøktarfrøðingur.
**Barnalæknar:** Fróði Joensen, Elmar Ósá og Britta Louise Olsen
**Læknaskrivarar:** Beinta Mohr og Lana Olsen



**Nakrar áminningar**

☺ Royking er bannað.

☺ Nýtið ikki luktilsi, meðan tit eru á deildini.

☺ Bert starvsfólk hava atgongd til køkin.

☺ Reiðið sengur, nýtið skáp og náttborð til tykkara ting.

☺ Tit hava ábyrgd av tykkara viðføri.

☺ Vaska og spritta hendur eftir blæuskift.

☺ Spritta hendurnar væl áðrenn tit fáa tykkum at eta.

**Tá ið barnið verður útskrivað**

Ofta verða kanningar gjørdar av barninum, sum tit ikki fáa svar uppá beinanvegin. Vit avtala, tá tit fara heim, hvussu tit fáa svar.

Málið er, at tit skula kenna tykkum trygg, tá ið tit fara heim, eisini tá serligar umstøður gera, at livihátturin hjá barninum má broytast.

Kommunulækni tykkara fær bræv frá læknanum, tá ið tit eru útskrivað. Vit hava regluligt samskifti við heilsufrøðingar og vit seta okkum í samband við tykkum, um tað er nakað, sum hon skal fylgja upp í heiminum.

**Aðrar upplýsingar**

Um tit hava onkran fyrispurning, eru tit vælkomin at ringja til Landssjúkrahúsið á tlf. **304500** og biða um Barnadeildina

Skrivararnir hjá barnalæknunum hava telefontíð frá kl. 10.30 til 12.30 gerandisdagar og svara tá á tlf. 304545. Ringið til hetta nummarið, um tit skulu broyta tíðir ella hava resept o.l.

Um tørvur er á tí, eru tit vælkomin at síggja Barnadeildina, áðrenn barnið verður innlagt. Um so er, vinarliga ringið á deildina frammanundan og avtalið eina tíð.

**Nøkur ting at hava við:**

¤ Møguligan heilivág hjá barninum
¤ Heilsubókina, um barnið er undir 1½ ár
¤ Sokkar og inniskógvar
¤ Tannbust o.a. til persónligt reinføri
¤ Sovidýr og/ella bestu leikuna hjá barninum og suttuna

Blæur, undir- og náttklæði eru á deildini.



**Spælistovan**

Bíðitíðin nýtist ikki at verða so drúgv, tí vit hava spælistovuna. Hon er fyri øll og er ætlað til uppihald, spæl og ítriv. Har eru nógvar leikur, bøkur, filmar, fløgur, og møguleiki er eisini til at hugna sær saman við at tekna, mála ella klippa. Tilfar til ítriv er ætlað børnunum. Eisini er atgongd til Wifi, har til ber at logga á brúkaran LS-guest.

Námsfrøðingur er á deildini allar gerandisdagar um dagin. Hon er um børnini, setir ymisk ítriv í gongd og kemur við hugskotum um spøl og annað, sum hóskar til barnið.
Vandamiklir lutir skulu setast ovarlaga, so smábørn ikki sleppa eftir teimum. Her verður serliga hugsað um heitar koppar, stokkar, perlur og nálir.

Av tí at lítið pláss er og oftast nógv børn og foreldur inni í spælistovuni, verða tit vinarliga biðin um at taka upp eftir tykkum.

**Máltíðir:**

| | |
|---|---|
| Morgunmatur | kl. 08.30 |
| Døgurði | kl. 11.30 |
| Millummáli | kl. 14.00 |
| Náttúrði | kl. 17.30 |
| Drekka | kl. 20.00 |



Umframt máltíðirnar er altíð mjólk, saft og djús í kuldaskápinum. Kaffi, te, frukt, keks og ráar gularøtur standa sum oftast inni í tekøkinum.
Hon/hann, sum er innlagdur saman við barninum, fær allar máltíðir á deildini. Onnur avvarðandi hava møguleika at keypa sær tvíflís, heitar rættir, salat og mangt annað í Caféini í forhøllini, sum er opin gerandisdagar frá kl. 08.00 – 20.00, leygardag frá kl. 10.00 – 20.00 og sunnudag frá kl. 14.30 – 20.00.

Til pinkubørnini hava vit mjólkablandingar og ymisk sløg av greyti á deildini.

**Góðgæti**

Tað er ikki skilagott at geva einum barni góðgæti, tí so etur tað ikki nóg mikið av heilsugóðum og styrkjandi mati. Eisini eru børn á deildini, sum ikki tola góðgæti. Vilja tit gjarna gleða barnið við onkrum, gev tí so heldur frukt og tílíkt. Barnið kann eisini fáa gleði av einum blaði ella einari bók.



**Vitjanartíðir eru kl. 15.00-16.00 og kl. 19.00-20.00**

Vit heita inniliga á vitjandi um at halda hesar tíðir og at hava fyrilit fyri øðrum børnum, sum hava brúk fyri hvíld. Hevur onkur varhugan av at hava smittandi sjúku, má viðkomandi ikki koma at vitja. Vitjandi skulu spritta hendur við komu, sjá vegleiðing.

**Skúlaundirvísing**
Børn, sum eru leingi innløgd, hava rætt til undirvísing. Vit skipa fyri hesum í samráð við Mentamálaráðið.